LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 124/2024 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, um ríkisrættarligu støðu Føroya

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu gongur við arbeiðinum viðvíkjandi ríkisrættarligu støðu Føroya?
2. Væntar løgmaður, at ein niðurstøða fæst áðrenn ríkisfundin, sum verður í summar?

Svar:

Til spurning 1 og 2
Tíðliga í ár hevði eg tveir fundir við floksforfólkini í øllum flokkum á tingi um ríkisrættarligu støðuna. Yvirskipað er tað mín greiða fatan eftir hesar fundir, at allir flokkar eru samdir um, at verandi støða ikki kann halda fram óbroytt, og at stóra avbjóðingin er, at Føroyar tørva størri uttanríkispolitiskar heimildir.

Hesum arbeiði eg víðari við. Tað er somuleiðis mín fatan, at flestu flokkar ynskja eina skipan, sum gevur Føroyum uttanríkispolitiskar heimildir, og sum byggir á samstarv millum javnbjóðis lond í einum felagsskapi.

Á ríkisfundinum, sum verður í Føroyum í næstu viku, verður greitt yvirskipað frá støðuni hjá Føroyum, men ætlanin er ikki at leggja nakað ítøkiligt uppskot fram. Eg haldi, tað er rætt at hava virðing fyri at Danmark og Grønland nærum hava verið í uttanríkispolitiskari undantaksstøðu seinasta hálva árið. Tað, sum hevur týdning, er, at arbeiðið verður gjørt rætt og væl, og í so breiðari semju sum møguligt. Bæði innanhýsis í Føroyum, og millum Føroyar og Danmark.

Í Tinganesi, 10. juni 2025

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo